## Listaframsýning hjá Lions í Eysturoy

**Listaframsýning hjá Lions Club Eysturoy 24 ár á baki í Runavíkar Skúla verður á páskum**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Báðar Páskadagarnar verður árliga listaframsýningin hjá Lions Club Eysturoy opin í Runavíkar Skúla, báðar dagarnar frá kl. 15 til 20, og hevur hetta tiltak staðið við síðani 1980, og er sostatt blivin ein fastur partur av hátíðarhaldinum á staðnum.

Framsýningin verður sett fyrra páskadag kl 15 av Jógvan á Lækjuni, landsstýrismanni í mentanar-málum. Undir setanini fer Frelsunarherurin at luttaka, og seta tey altíð ein serligan dám á, har tey eru við.

Hesi 24 árini framsýningin hevur verið, er ein hópur av listaverkum framsýnd. Luttøkan hevur ligið millum 30 og 50 listafólk, við 2-300 góðum og fjølbroyttum listaverkum.

Framsýningin hevur rúmað málningum, tekningum, akvarellum, og klippum v.m., og hevur gjøgnum árini verið sera fjølbroytt. Saman við royndum og drivnum listarfólkum, hava ung og óroynd fólk her havt møguleikar at royna síni listarligu evnir og at sýna tey alment fram. Í ár sýnist áhugin til at luttaka í framsýningini at vera størri enn nakran tíð.

Á framsýningini vera eisini lutaseðlar seldir av listaverkum, og fer samlaði ágóðin av tiltakinum í ár til arbeiðið hjá Frelsunarherinum.



# Gospel uppá sítt besta

**Árliga HMU- konsertin var leygarkvøldið hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir VOX, Thirst, MMM og Credo høvdu fingið uppgávuna at undirhalda áhoyrarunum í slakar tríggjar tímar, og megnaðu tey hetta sera væl**

HMU- KONSERT
*Henny Olsen*

Um 300-400 fólk høvdu leygarkvøldið funnið sær leiðina til Fuglafjarðar, har tann árliga HMU- konsertin var hildin. Hesaferð høvdu bólkarnir VOX, Thirst, MMM og Credo meldað seg til. Talan er her ikki um beinleiðis nýggjar bólkar. Allir vóru teir við í fyrsta Gospel Prixnum, sum var hildið í fjør, uttan VOX, sum tó hevur verið til í fleiri ár.

### Fantastisk byrjan

Fyrsti bólkur á pallinum var gospelkórið VOX úr Eysturoynni. Tey framførdu fleiri fantastiskar gospelsangir, og eisini áhoyrarinir sluppu uppí part.

Tá tey stóðu á pallinum og sungu, sum tað galt lív, mintu tey ikki sørt um tey myrku baptistakórini, sum tú sært í USA. Har var frítt hjá teimum at syngja og røra seg og liva seg inn í tær deiligu rytmirnar, sum orkestrið hjá teimum stóð fyri.

Tey framførdu fantastiska væl við fleiri solosangarum, sum eisini stóðu seg avbera væl. VOX hevði veruliga áhoyararnar við sær, sum allir sóu út til at vilja sleppa upp á pallin at syngja við. Alt í alt ein fantastisk framførsla av Eysturoyarkórinum, sum ikki stendur nakað aftan fyri gospelkórunum í útlondum.



Næsti bólkur á skránni var Thirst, sum eisini er úr Eysturoynni. Tað er ein ungur, men lovandi bólkur. Til Gospel Prixið í fjør vóru tað bara tey trý Jákup, Beinta og Sóleyg, sum mannaðu bólkin, men til hetta tiltakið høvdu tey fingið sær styrk. Av tí sama gjørdist eitt sindur betri lív í nøkrum av sangunum, men tó spældu tey eisini tann vakra og stilla tónleikin, sum tey eisini duga so væl. Framførslan hjá teimum var frálík, tí tey duga at liva seg inn í tónleikin. Tær vøkru røddirnar hjá Beintu og Sóleyg gjørdu bara framførsluna betri. Við hesum frálíkum bólkum var lagt væl upp til næsta navnið.

### Rættiligt lív í

MMM var næstur á pallinum. Tey koma úr Vágunum og spæla rock- tónleik. Tey løgdu út við hørðum rocktónum, og fingu alt fyri eitt lív í áhoyrararnar.

Tey vístu við hesi framførslu, at tey heilt avgjørt eru ein av betru bólkunum í Føroyum.

Kvinnuligi forsangarin sang frálíkt, og tann mannligi sangarin, sum eisini spældi á guitar, var tann í skaraði framúr. Hann livdi seg rættiliga inn í tónleikin. Hann var stillur, tá tónleikurin var meira róligur, men stóð afturfyri og hoppaði, tá tað gjørdist eitt sindur villari, og hetta dámdi áhoyrarunum avgjørt. MMM vóru enntá klappaði fram aftur til eitt eykanummar, og tí tekur man altíð við.

Síðst á pallin var Credo, sum er mannaður av klaksvíkingum. Teir framførdu vælsvingaðan rock- tónleik, og tað er eisini tað, teir eru bestir í. Teir gjørdu rættiliga vart við seg í Gospel Prixnum, og hava teir eisini síðani tá verið og spælt til fleiri tiltøk ymsastaðni í landinum.

Teir duga sera væl at spæla og framføra tónleik, tað hava teir alla tíðina víst, og hetta var einki undantak. Talan var her um eina inniliga og framúr góða framførslu. Sangarin er sum skræddaraseymaður til hetta slagið av tónleiki, og tað er eisini avgjørt eitt pluss. Tónleikur teirra er sera góður við fleiri lítlum detaljum, sum gera tað til eina góða heild. Heilt avgjørt ein betru framførslunum hjá Credo.

HMU- konsertin í 2004 kann sigast at vera sera væl eydnað. Einki gekk galið, og við at hava tveir frálíka stuttligar menn, Ásbjørn og Finn, at tvætla, felagssang og eina andakt, sum Reimund Langgaard hevði, gjørdust løturnar í millum bólkarnar sera lítlar. Alt var sera væl fyriskipað, og nú kann skiljast hví tað nevniliga er eitt árligt tiltak. Áhoyrarirnir hugnaðu sær óført, og teir ætlað óivað til konsertina næsta ár.



# Partabrævamentanin skal mennast




*Tveir av fyrilestrarhaldarunum á temadegnum um íløgur. F.v. Danski bankaserfrøðingurin, Bjarne Jensen og fíggjarleiðarin á Føroya Sparikassa, Finn Danberg*

*Mynd: Podl*

**Føroya Sparikassi og Kaupthing brynja seg til nýggjar tíðir, har kundin setur stór krøv til vegleiðing um keyp og sølu av partabrøvum. Mánakvøldið skipaðu Føroya Sparikassi, Kaupthing og TemaKapital fyri tema-degi um at gera íløgur í partabrøv**

NÝGGJAR AVBJÓÐINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Týsdagin í seinastu viku varð ein nýggjur partur av føroyskari fíggjarsøgu skrivaður, tá avtala millum Virðisbrævamarknaður Føroya (VMR) og Kauphøll Íslands varð endaliga undirskrivað.

Fyri flestu føroyingar er talan um óroyndan lut at gera íløgur í virðisbrøv, men fólk innan føroyska fíggjarheimin vænta, at innan nøkur fá ár, verður vanligari hjá føroyingum at eiga virðisbrøv.

Í hesum sambandi eru Føroya Sparikassi og virðismeklarafelagið, Kaupthing, av álvara farin undir at fyrireika seg til, at áhugin fyri virðisbrøvum, fer at økjast munandi.

Saman við íløgufelagnum Tema Kapital skipaðu Føroya Sparikassi og Kaupthing mánakvøldið fyri sonevndum tema-degi um at gera íløgur í virðisbrøv.

### Mentan mennast

Fíggjarleiðarin hjá Føroya Sparikassa, Finn Danberg, var millum fyrilestrarhaldararnar á temadegnum. Finn Danberg sigur seg vera sannførdan um, at komandi árini fara fleiri og fleiri føroyingar at eiga virðisbrøv. Hetta setur stór krøv til føroysku fíggjarstovnarnar, og Føroya Sparikassi er fyrireikaður til avbjóðingina.

– Talan verður um eitt nýtt tíðarskeið, har tað verður vanligari og vanligari at gera íløgur í virðisbrøv. Higartil hava fólk verið von við at seta sína uppsparing í sparikassan, men við broytingunum í kapitalvinningskattalógini og rentutryggingarlógini eru møguleikarnir fyri virðisbrævaíløgum nógv broyttir. At gera íløgur í virðisbrøv er øðrvísi, og vit mugu tí sum peningastovnur tryggja kundum okkara so góða ráðgeving og tænastu sum gjørligt, sigur Finn Danberg.

Hann leggur áherðslu á, at orðið tryggleiki er avgerandi í samband við íløgur í virðisbrøv. Fíggjarleiðarin í Føroya Sparikassa vísir á, at tá talan er um ein nýggjan heim fyri kundarnar, er tað alneyðugt, at varisliga verður farið fram, so kundarnir kunnu kenna seg tryggar, tá tey velja at fara undir at gera íløgur í virðisbrøv.

– Tað er ógvuliga týðandi, at vit sum ráðgevi altíð kunnu hyggja kundan í eyguni. Okkara ráðgeving kemur tískil altíð taka støðið í kundans veruliga tørvi, greiðir Finn Danberg frá.

### Nýggj deild

Síðan ár 2000 hava Kaupthing Føroyar og Føroya Sparikassi samstarvað um íløgufelagið, Kaupthing Invest. Umframt Føroya Sparikassa og Kaupthing Føroyar, hevur Kauphing Bank eisini verið við í samstarvinum. Føroya Sparikassi eigur ávíkavist 49% og 25% av áðurnevndu fyritøkum.

Kauphing Invest, sum fyrr í ár skifti navn til Tema Kapital hevur fleiri deildir. Deildirnar Norrøn partabrøv og lánsbrøv í donskum krónum, hevur Kaupthing Føroyar røkt, meðan Kauphing Bank hevur røkt deildina íslendsk lánsbrøv. Føroya Sparikassi er depotbanki hjá øllum deildunum.

Tema Kapital økir nú um virksemi sítt. Avtala er gjørd við Bjarne Jensen um eina nýggja deild, Stockrate, ið ger íløgur í altjóða partabrøv.

### Støðið í søguni

Danski bankaserfrøðingurin, Bjarne Jensen, sum stendur á odda fyri Stockrate, var eisini millum fyrilestrarhaldarnar mánakvøldið. Hann kunnaði um felagið og segði seg vera fegnan um samstarvsavtaluna við TEMA Kapital.

– Eg trúgvi upp á tann langa og treysta leikin. Tað er ein umskiftiligur heimur at keypa og selja virðisbrøv og tí er tað avgerandi, at kundin setir sínar pengar í fyritøkur, sum duga at vinna pening og passar teir á haldgóðan hátt, sigur Bjarne Jensen.

Stockrate velur fyritøkurnar eftir, hvussu væl tær hava staðið seg seinastu árini. Metingin verður gjørd eftir einum teldufor-riti. Telduritið hyggur fyrst og fremst eftir møguleikunum hjá fyritøkunum at vinna pening og fíggjarstøðuni.

## Ungdómsbókin Nornadómur á føroyskum

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið ungdómsbókina Nornadómur eftir Vilborg Dáviðsdóttir út. Tóra Tóroddsdóttir hevur týtt úr íslendskum**

**Tíðindaskriv**

Nornadómur er onnur bókin í røðini um Korku, sum er leysingabarn, ið tann norski landnámsmaðurin Tórálvur Tórisson á Roykjavøllum fær saman við Mýruni, einari írskari trælkvinnu. Í fyrru bókini Við Urðarbrunn, ið Bókadeildin gav út í fjør, rýmdi Korka úr Íslandi og kom at enda á Heiðina í Danmørk, har víkingurin úr Suðuroyggjum, Atli Atlason, keypir hana sum træl. Hóast stættarmunin gerast Korka og Atli góð. Tá ið Atli kemur illa fyri, bjargar Korka honum, men letur hann lova at loysa seg úr trældómi afturfyri. Hann játtar, og tey rýma úr Heiðini um náttina. Tey koma til lands í Suðuroyggjum, men ættin hjá Atla er ikki fegin um gentuna, sum hann hevur kosið sær. Tey síggja tí ikki annan møguleika fyri hjúnarbandi enn at rýma og gerast niðursetufólk onkra aðrastaðni. Korka vil ógvuliga fegin sleppa á Vesturfirðirnar í Íslandi, tí rúnirnar hava sagt henni, at systir hennara og systurdóttirin eru í vanda…

Bøkurnar um Korku fara fram í víkingatíð, og umframt at skriva eina sera spennandi og hugtakandi søgu, megnar høvundurin framúr væl at lýsa gerandisdagin hjá víkingum. Í Íslandi verða bøkurnar brúktar í søgufrálæruni í miðnámsskúlunum.

Nornadómur er 192 síður, heft við klaffum og kostar kr. 150.




*Nornadómur er onnur bókin um Korku*